**Heimarøktin og Serforsorgin**
*Meginskrivstovan*

# Leiðsluskrivari

Av tí at okkara skrivstovuleiðari gjøgnum mong ár fer frá, verður starv sum leiðsluskrivari til Meginskrivstovuna hjá Heimarøktini og Serforsorgini lýst leyst til setan skjótast gjørligt.

Hevur tú hug á avbjóðingum, ert sjálvstøðug/ur, álítandi og røkin so bjóða vit eitt starv sum inniheldur m.a. hesar høvuðsuppgávur:

- standa fyri og uppbyggja journalskipanina
- skrivari hjá stjóranum
- samskipa skrivstovuvirksemi
- hava starvsfólkaviðurskifti og arbeiðsætlanir á Meginskrivstovuni um hendi
- málsviðgerð og avgreiðslu av málum
- luttøka í tvørgangandi samstarvi

**Vit vænta at tú lýkur hesi førleikakrøv:**
- hevur viðkomandi útbúgving og starvsroyndir
- hevur hollan málsligan førleika serliga í føroyskum
- ert von/vanur við at skriva
- kennir til elektroniska journalskipan
- hevur hollan telduførleika
- hevur góð samskiftisevni og dugir væl við fólki

**Løn- og setanarviðurskifti:**
Løn- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið er Heimarøktin og Serforsorgin. Tænastustaðurin í løtuni er Meginskrivstovan

Tann, ið settur verður má kunna tola broytingar í starvinum, og at hetta kann verða umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Heimarøktina og Serforsorgina á telefon 304020 og tosa við Mary J. í Garði, stjóra.

**Umsóknarfreist:** 2. mars 2004

**Umsóknir:**
Skrivlig umsókn, við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu sendast til:

**Heimarøktin og Serforsorgin**
att.: Mary J. í Garði, stjóri
Eirargarður 2, 2. hædd
FO-100 Tórshavn




**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3729
**Navn:** Sp/f Hentze
**Adressa:** c/o Jákup Andreas Hentze, 650 Toftir.
**Kommuna:** Nes Kommuna
**Stovningardato:** 10.02.2004
**Viðtøkudato:** 10.02.2004
**Kapitalur:** Kr. 100.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 100.000,00 til kurs 100.
**Stovnari:** Jákup Andreas Hentze, 650 Toftir.
**Stjórn:** Jákup Andreas Hentze, 650 Toftir.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjóranum.
**Grannskoðari:** P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 10.02.2004 - 31.12.2004
**Endamál:** Endamál felagsins er boring, útleigan o.a. í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 25. februar 2004*

*Kristin Balle*




**TOYOTA**

| | Skrás.: | Km.: | Sýnaður: | Prísur: |
|---|---|---|---|---|
| TOYOTA CAMRY 2.2 GL SEDAN | okt 97 | 77.000 | jun 03 | 149.000 |
| TOYOTA YARIS 1.0 H/B TERRA | nov 99 | 25.000 | nov 03 | 90.000 |
| TOYOTA CARINA E 1.6 XLI L/B | apr 96 | 106.000 | - | 66.000 |
| TOYOTA CARINA E 1.8 GLS SEDAN | jun 96 | 108.000 | - | 71.000 |
| TOYOTA COROLLA 1.9 D TERRA SEDAN | jul 00 | 106.000 | mar 03 | 115.000 |
| TOYOTA COROLLA 1.6 LUNA L/B | okt 98 | 60.000 | - | 89.000 |
| TOYOTA COROLLA 1.6 H/B | mar 99 | 59.000 | - | 88.000 |
| TOYOTA YARIS 1.0 H/B TERRA | jan 00 | 40.000 | - | 105.000 |
| TOYOTA AVENSIS 2.0 SOL PLUS SEDAN | mai 98 | 98.000 | - | 135.000 |
| TOYOTA CAMRY 2.4 SEDAN | jun 02 | 58.000 | - | 249.000 |
| TOYOTA AVENSIS 1.8 SOL SEDAN | nov 00 | 146.000 | - | 124.000 |
| TOYOTA COROLLA 1.3 TERRA L/B | jan 99 | 66.000 | feb 03 | 78.000 |
| TOYOTA COROLLA 1.3 TERRA | jul 99 | 74.000 | jun 03 | 92.000 |
| TOYOTA STARLET 1.3 XLI | mai 95 | 82.000 | - | 38.000 |
| TOYOTA AVENSIS 2.0D D4-D TERRA | des 01 | 45.000 | - | 187.000 |
| TOYOTA HILUX 2.4 D 4x2 EXTRA CAB 2D | apr 00 | 64.000 | - | 120.000 |
| LEXUS IS 200 SPORT 4D 6G | des 02 | 13.000 | - | 275.000 |
| FORD ESCORT 1.8 TD | jun 97 | 111.000 | sep 03 | 58.000 |
| TOYOTA COROLLA 1.4 LINIEA TERRA S/D | jun 00 | 38.000 | - | 118.000 |
| DAEWOO TACUMA | mai 01 | 43.000 | - | 124.000 |
| TOYOTA COROLLA 1.6 LINIEA TERRA SED | apr 03 | 22.000 | - | 170.000 |
| OPEL ASTRA 1.7 S/D | jun 97 | 161.000 | jun 02 | 60.000 |
| TOYOTA CARINA E 1.6 XLI SEDAN | jun 95 | 186.000 | - | 67.000 |
| HYUNDAI ACCENT 1.3 | aug 00 | 27.000 | - | 72.000 |

Bilar á listanum kunnu vera seldir
Toyota bilar hava trý ára garanti frá fyrsta regestrerings dato
Bilar yvir kr. 75.000,- hava 3 mðr. brúktbilaváttan

Sosialurin 341800

**Toyota í Føroyum**
**REYNI SERVICE**
Tlf. 353040 - Fax 353041
www.reyniservice.fo



# Skúlin við Ósánna

Søkt verður eftir lærara frá 15. mars til 30. juni 2004.

Starvið verður lønt samb. avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1-27.4.

**Tímatalvan:**

| | |
|---|---|
| Evnafrøði | 10. flokki |
| Alisfrøði | 9. og 8. flokkur |
| Støddfrøði | 5., 3. og 1. flokkur |
| Náttúra/Tøkni | 4. flokkur |
| Heimst./Fimleikur | 1. flokkur (dreingir) |
| Flokslærari | 1. flokkur |

Nærri fæst at vita um starvið frá skúlastjóranum á tlf. 218373.

Umsóknir til starvið skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi hósdagin 11. mars 2004.

**Skúlastýrið fyri Ósáskúlan**
v/ Óluva Klettskarð
Stoksoyravegur 7
700 Klaksvík

# Línubátur til sølu HEYKUR TG 14



Báturin er 19 brt og hevur fiskiloyvið 4A.
70 dagar á landleiðini og 30 dagar á Føroya Banka.
Boð undir 1.080.000 kr. ongan áhuga.

**www.batur.fo**
**telefon 33 39 40**
**Gsm 22 87 41**




**Skeiðsdepilin** Føroya Handilsskúli · Tekniski Skúlin

## Spennandi telduskeið fyri frisørar

Framtíðar frisørsalongin

Skeiðið er ætlað frisørum, sum hava hug at læra at brúka telduna í gerandisdegnum.
Undirvíst verður í einum forritið, sum er gjørt til frisørsalongir. Forritið er lætt at brúka og kann eina rúgvu t.d.
- Kassauppgerð
- Kundabók
- Vørugoymslu
- Bílegging av tíð v.m.

**Tíð:** 22. mars 2004, kl. 9.00 - 16.00

**Skeiðleiðari:** Jonhard Larsen
**Stað:** Hárfríðkanardeildin á Tekniska Skúlanum í Tórshavn, Smiðjugerði.
**Kostnaður:** 1.700,00 kr. íroknað fráláeru, tilfar og mat.
**Tilmelding:** Áðrenn 12. mars 2004

Yrkislærd við lærubrævi frá Føroya Læruráð/ Yrkisdeplinum kunnu søkja stuðul eftir reglugerð um eftirútbúgving av yrkislærdum. Vanliga fáa umsøkjarar, ið lúka treytirnar ein part av skeiðsgjaldinum endurgoldið. Umsøkjarar, ið hava goldið í eftirútbúgvingargrunnin "VITAN", kunnu søkja um stuðul haðani.
**Umsóknarbløð fáast á Skeiðsdeplinum.**

Marknagilsvegur 77, Postrúm 177, 110 Tórshavn
tel 318813, Fax 313374, info@skeidsdepilin.fo

team85 • 35800

**HJÁ GUNLEIVI**

# Bakaralærlingur

Søkt verður eftir bakaralærlingi.

Lærutíðin er 4 ár, harav 35 vikur á tekniskum skúla.

Arbeiðstíðin er mest um dagin, hóast nakrar náttarvaktir eru.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til okkara og spyrja eftir Eli Andreasen.

**Bakaríið hjá Gunleivi**
Tlf. 59 88 38 ella 31 21 61




# Starvsfólk
## til Ferðslutrygd

Søkt verður eftir fólki til hálvtíðarstarv – við møguleika fyri øktari arbeiðstíð.

Hevur tú hugflog og dugir tú at seta ætlanir í verk, er hetta júst rætta starvið til tín.

Tú skal megna at taka tær av uppgávum frá byrjan til enda; heilt frá hugskoti til ætlanin er framd. Tú skal duga væl at leggja til rættis, hava ans fyri smálutum og tora at siga tína hugsan. Tað er eisini alneyðugt, at tú hevur góðan málsligan førleika, bæði í skrift og talu. Eins sjálvsagt er, at tú hevur góðan førleika at nýta teldu.

Royndartíðin er tríggjar mánaðir, og starvið fyribils galdandi eitt ár. Starvstíðin byrjar sambært avtalu.

Nærri frágreiðing um starvið fæst við at venda sær til *Jón Kragesteen, leiðara, á tlf. 310204*.

Umsókn saman við viðmælum, upplýsing um útbúgving og starvsroyndir, skulu vera okkum í hendi *í seinasta lagi 1. mars 2004*.

**Ráðið fyri Ferðslutrygd**
Yviri við Strond 21 · 100 Tórshavn
Tlf. 310204 · Faks 310979
www.rff.fo · rff@rff.fo

# Kunngerð

Sagt skal verða frá at avlopsskattur fyri 2003, herundir avlopsskattur stavandi frá ikki nýttum barnafrádrátti, verður mótroknaður í veitingini hjá viðskiftafólkum, ið móttaka forsorgar- ella endurbúgvingarhjálp frá Almannastovuni.

Avlopsskatturin verður mótroknaður í veitingini fyri februar.

Um avlopsskatturin er hægri enn ein mánaðarveiting, verður yvirskotið flutt til næstu mánaðarnar.

**Almannastovan**

# Bileftirlitið stongt 1. og 2. mars 2004

Í samband við skeiðvirksemi, eru skrivstovan og sýnshallirnar á Bileftirlitinum stongdar mánadagin 1. mars og týsdagin 2. mars 2004.

Opið verður aftur sum vanligt mikudagin 3. mars

**Bileftirlit Føroya**